

# Ósemja um maritimar útbúgvingar

**Helena Dam á Neystabø boðaði í gjár frá, at útbúgvingarnar á Vinnuskúlanum í Havn frá 1. januar 2011 verða fluttar til Klaksvíkar. Meðan Gunvá við Keldu fegnast, skírir Heðin Mortensen avgerðina skelkandi, stuttskygda og púra visjónleysa**

Poulsen

Frá 2011 verður Trygdarmiðstøðin í Klaksvík flutt frá Fiskimálaráðnum til Mentamálaráðið, og Trygdarmiðstøðin og Klaksvíkar Sjómansskúli koma undir somu yvirskipaðu leiðslu, sum er stjórin á Tekniska Skúla, Rúni Heinesen. Roknað verður við, at verandi útbúgvingar á Klaksvíkar Sjómansskúla sum frá líður eisini verða í nýggju hølunum á Trygdarmiðstøðini.

Soleiðis boðar Mentamálaráðið frá í skrivi.

Ein nevnd hevur sitið at gjørt tilmæli til hvussu maritimu útbúgvingarnar í framtíðini skulu skipast, samstundis sum ábyrgdarøkið verður flutt frá Fiskimálaráðnum til Mentamálaráðið.

Ætlanirnar verða skornar út á henda hátt:

» Í august 2012 er ætlanin at uppstiga skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum til bachelorútbúgvingar á Fróðskaparsetrinum. Í hesum sambandi hevur Mentamálaráðið heitt á stjóran á Vinnuháskúlanum um at halda fram í starvi sínum til 1. september 2012.

Í august 2012 verða skipara- og maskinistútbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum fluttar til Klaksvíkar, har skipaður verður ein maritimur depil í samstarvi við Tekniska Skúla. Umframt Klaksvíkar Sjómansskúla og Trygdarmiðstøðina, kemur depilin eisini at fevna um Brandstøðina við Áir«.

### Fall ikki í góða jørð

Men hesar ætlanir verða ikki heilsaðar vælkomnar av politikarunum í Havn. Higartil hava bæði borgarstjórin og Levi Mørk gjørt vart við seg, og tað sum eyðkennir hesar báðar er, at teir umboða sama flokk, sum Helena Dam á Neystabø.

Undir yvirskriftini »Landsstýriskvinnan talan við tveimum tungum – sum vant« leggur Heðin Mortensen eftir landsstýriskvinnuni og serliga eftir avgerðini at flyta skipara- og maskinistútbúgvingarnar frá Vinnuháskújlanum til Klaksvíkar.

» Við vaksandi altjóða krøvunum til maritimu útbúgvingarnar hevur leingi verið greitt, at tær skulu uppstigast og fakliga orkan savnast. Samsvarandi hesum fekk landsstýriskvinnan 5. mars 2010 eitt greitt tilmæli, har maritimu útbúgvingarnar skuldu leggjast saman og skipast bygnaðarliga saman við Fróðskaparsetrinum í Tórshavn«, skrivar Heðin Mortensen.

Og spádómurin hjá borgarstjóranum er dapur.

» Henda avgerðin fer tí at hava eina røð av negativum og sjálvstyrkandi avleiðingum ikki bert fyri maritimu útbúgvingarnar, men eisini fyri alla menning av hægri útbúgvingum og gransking í Føroyum«, sigur Heðin Mortensen í skrivinum.

Og landsstýriskvinnan fær hendan boðskap við á vegnum:

» Við vakstrarætlanini hevur Tórshavnar kommunu greitt meldað út fyri landsins myndugleikum, at kommunan satsar stórt uppá júst útbúgving og gransking.

Tað ger landsstýrið eftir øllum at døma ikki«, skrivar Heðin Mortenen.

# Ung fyri mannarættindum í SMS

**Fríggjadagin og leygardagin skipar Føroya Handilsskúli fyri framsýning í SMS, har næmingar frá fakinum Dekoratión vísa fram visuella marknaðarføring**

Leo Poulsen

Ein av valgreinunum fyrsta árið á FHS er dekoratión, ella visuell marknaðarføring.

Lærarin er Fía Norðberg, og hon hevur tikið stig til eina framsýning við tí tilfari, sum næmingarnir hava greitt úr hondum hesar tímarnar.

Talan er um fimm flokkar við einum 20 næmingum í hvørjum, so í alt er talan um áleið eitthundrað næmingar, sum verða við til hetta tiltakið, sigur Fía Norðberg.

Næmingarnir koma úr so at siga hvørjum króki í landinum, so tey leggja ikki einki fyri at vera við í tiltakinum, sum verður í SMS fríggjadagin og leygardagin.

Næmingarnir koma til Havnar hóskvøldið fyri at seta framsýningina upp, og so verður hon alment sett fríggjamorgunin klokkan 10, tá forkvinnan í Amnesty Føroya Deild, Katrin Dam á Neystabø, letur framsýningina upp, sigur Fía Norðberg.

Í tí tilfari, sum sýnt verður fram, verður dentur lagdur á mannarættindi og umhvørvi, eins og næmingarnir hava gjørt sær tínar tankar um, hví órættvísin í heiminum er so stór. Eitt nú, at summi hava í yvirflóð, meðan onnur einki eiga, summi válka sær í mati, meðan onnur hugra.

Eisini hava næmingarnir gjørt stutt filmsklipp, sum verða sýnd á framsýningini, og eitt av hæddarpunktunum verður ein mótasýning við endurnýtsluklæðum, sigur Fía Norðberg.

Amnesty Føroya Deild skipar eisini fyri tiltakinum »Tendrið eitt ljós og skrivið eitt brævs«, sum verður skipað fyri í Mannarættingarrúminum. Tiltakið verður skipað sum kafé frá klokkan 16 til 19 fríggjadagin.

**Skráin er henda:**
Fríggjadagin 10. Des.
kl. 10.00 (Tiltakið uml. 30min)
Katrin Dam á Neystabø setur framsýningina
Sangur
Dansigentur úr Fuglafirði
Mótasýning við endurnýtsluklæðum
Sangur
Filmur (verður vístur allan dagin)
Kl. 16.30 (Tiltakið uml. 30min)
Sangur
Dansigentur úr Fuglafirði
Mótasýning við endurnýggjuklæðum
Sangur
Filmur
Leygardagur 11. Des.
Kl. 13.00
Sangur
Dansigentur úr Fuglafirði
Mótasýning við endurnýtsluklæðum
Sangur
Filmur